SvF t‡skvøldi› 6. mai:

Jersild móti Gates

Ja, so var hann aftur á blettinum, Jens Olaf Jersild, ein av teimum mest elska›u, og mest hata›u persónunum í danska kongaríkinum. Hesufer› var› mótstø›uma›urin ikki hvør sum helst, nevniliga heimsins ríkasti ma›ur, Bill Gates.

Spurningurin er so, hvussu nógv Jersild megnar at gera vi› Gates og hansara fer› eftir tøkniliga motorvegnum. Danski brúkarin er í øllum førum varugur vi› at hol eru í skipanini hjá Microsoft, hol i› eru og vilja blíva misn‡tt av teldusn‡tingum og ø›rum í hesum fer›alagi á nevnda motorvegi



Windows skipanin er full av holum, i› kunnu gera lív títt til eitt h__ á jør›.

Eftir stendur so spurningurin: Fekk Jersild skublina undir Gates? Nei ta› fekk hann neyvan, ringt er og ver›ur ta›, at stø›ga hesum teldumilliarderinum á fer› síni eftir tøkniliga motorvegnum. Tó kunnu vit rokna vi›, at Windows fer at gera meira vi› trygdarskipaninar í framtí›ini, tí vit eiga og mugu ganga út frá, at slíkar sendingar ikki bert vera gjørdar í Danmark. Vit vita at journalistar kring allan heimin hava fingi› sær eitt n‡tt offur, nevnliga Bill Gates. Og innan long tí› er farin, fara teir á Microsoft ivaleyst at laga seg eftir ynskjunum hjá fjór›a statsvaldinum – teimum hungrandi fjølmi›lunum, i› vilja gera alt fyri at fáa heimsins ríkasta mann ni›ur á knøini.

At Bill Gates hevur vunni sera nógvan pening gjøgnum tí›irnar, er ongin ivi um. Um tú leitar á Altavista, ella ø›rum netleitarum, efitir greinum i› hava tilkn‡ti til Bill Gates, finnir tú fram til, at ta› eru fleiri milliónir til av slagnum.

At fólk í millióntavís hava lagt greinir um Bill Gates inn á Alneti›, er so eitt, men um tú tekur eina stakroynd, og lesur nakrar av greinunum, er greitt, at 90% av hesum greinum eru anna›hvørt skemtisøgur, av tí minni pena slagnum, um mannin, ella er talan um greinar, sum l‡sa pengapungin hjá Bill Gates. Ella vi› ø›rum or›um, eitt ta› sum hugtekur flest fólk vi› tilkn‡ti til Alneti›, er hvussu nógvan pening ma›urin vinnur sær um ári›, dagin ella minuttin.

Sera mótsigandi, tí øll hesi, sum hava so ilt av pengapunginum hjá Hr. Gates, sita sjálvi og leggja greinar um hetta inn á neti›, vi› júst teimum forritum, sum hava gjørt manning so ríkan.

Á myndini omanfyri, sæst hvussu pengapungurin hjá Bill Gates er nørdur seinastu árini, og hóast myndin ikki er so grei›, er talan um eina eksponentielt vaksandi talvu. Hetta er júst ta› sum fólk um allan heimin eru so ørg inn á, so óansæ› hvussu nógv Jersild er hata›ur av teimum hann rakar meinast, so er hann elska›ur av fjøldini. Hetta kunnu vit ikki siga um Gates.

Summa sumarum, Jersild vann moralska strí›i› móti Gates, men ta› er Gates sum trumlar ví›ari eftir tøkniliga motorvegnum, vi› 120 kilometrafer›, í øllum førum til fleiri Jersildar gera vart vi› stø›una – livst so spyrst.

Finn@sosialurin.fo

Á heimasí›uni hjá Rapporten, i› er danska heiti á sendingini, stendur ein grein um sendingina, vi› heitinum Farlige huller i Microsoft Windows. Og ta› eru júst hesi hol Jens Olaf Jersild vi›ger í sendingini. Vitandi at hann ikki er mentur at stoppa hesi hol einsamallur, er ta› hansara uppgáva at gera vart vi› feilirnar í Windows skipanini.

Sendingin byrjar vi› spurninginum: Er Windows trygt, ella eru onnur vi› at yvirtaka lív títt? Hesum spurningi fær Jersild hegnisliga svara, vi› at n‡ta tvey offur, i› grei›a frá, hvussu teldusnildingar nærum hava lagt lív teirra í oy›i. Hátturin hjá teldusn‡tingunum er einfaldur, teir senda tær ein mail, har sendarin nevnist No Name. Vi› at opna vi›løgdu fílina, er opi› hús í teldu tíni, og teldusn‡tingurin kann gera hvat hann vil inni á teldu tíni, eins og hann kann n‡ta tín samleika í ø›rum samskifti.

Eisini megna›i Jersild at vísa, at sjálvt um tú hevur ein elektroniskan brandmúr uppsettan í telduni, ber til at koma ígjøgnum hjá teldusn‡tingum, og antivirus skipaninar kunnu slett ikki n‡tast í hesum sambandi.

Snildisliga fekk Jersild infiltrera› nakrar serfrø›ingar, i› ikki høvdu gó› or› at bera Microsoft fyritøkuni, og hesir greiddu frá, hvussu Bill Gates og virki hansara, á sera liberalan hátt, velja at geva brúkarunum fult ræ›i, og fulla ábyrgd av teldutøknini, solei›is at tann klóki hevur frítt spæl tá hann skal lumpa tann minni› klóka.

Eisini var práta um forriti›, Back Orifis, i› ger ta› lættari hjá teldusn‡tingum at vitja teg og ikki minst teldu tína.

Ni›urstø›an var grei›, Bill Gates og Microsoft eru ikki brúkaravinarligir tá ta› kemur til trygdarskipanir, og



Spurnakassin

> *PANEL*
>
> *Hava tit ein spurning um telduútbúna (HW) ella ritbúna (SW), hvat tit hava rætt og loyvi til ella okkurt heilt anna›, kunnu tit senda tykkara spurning til spurnarkassan.*
>
> *Í panelinum at svara spurningum hava vit serkøn fólk at heita á.*
>
> *Sendi› spurningin til: sid@sosialurin.fo*

Spurningur:

Løgin málbur›ur vi› chatti

Hvat merkir styttingin *gg*? Hetta ver›ur nógv brúkt í chatti. Hvar kann eg finna eitt yvirlit yvir tær nógvu styttingarnar og ímyndirnar sum ver›a brúktar í chatti?

Kristian vi› telduposti

Svar:

Ta› krevur sín mann at chatta, tí styttingar og ímyndir rúka um oyruni/eyguni og oftani er ringt at tí›a ta› í sagt ver›ur. *gg* merkir at man flennir. Summi brúka styttingina LOL, sum stendur fyri "Laughing Out Loud" (flenna hart). Men umframt hesar finnast nógv fleiri og kanska tann mest brúkta ímyndin er :-) sum vísir eitt smílandi andlit um tú hellur høvdi á til vinstru.

Á alnetinum eru fleiri heimasí›ir sum hava frágrei›ingar um hesar nógv brúktu styttingar og ímyndir. Ein teirra er at finna á www.thirdage.com/features/tech/netglos/index.html. Har finst eisini ein top 10 listi vi› mest brúktu chatslangor›um og styttingum júst nú. Hann sær solei›is út:

AFK
Stytting fyri 'away from keyboard.' Hendan stytting ver›ur brúkt í chatting, fyri at siga hví onkur bráddliga ikki er at treffa, sum til dømis um onkur bankar uppá ella at fartelefonin ringir.

(::[ ]::)
Ímynd av heftiplástri. Ver›ur brúkt tá onkur bjó›ar seg til at hjálpa ella troysta.

ROTFLMAO
Stytting fyri "Rolling on the Floor Laughing My A** Off" Ógvusligur látur.

%-)
Ímynd av at man er í ørviti men lukkuligur; hevur kenning ella er ávirka›ur av onkrum uttan at hava mist ræ›i› á sær sjálvum (lættari rúsa›ur)

IMAO
Stytting fyri 'in my arrogant opinion.' Mín arroganta meining.

LOL
Stytting fyri 'laughing out loud.' Flenna hart.

@>--,--
Ímynd av einari rósu.

BTW
Stytting fyri 'by the way.'

:-P
Ímynd av at gálva.

8-)
Ímynd av brillum.

:-) sid@sosialurin.fo

Nøkur gó› mi›:

Á útró›ri á netinum

Nú ein dagin, kom okkum á K.T.-horninum til hugs, at royna nakrar føroyskar heimasí›ur. Talan var um eina óformella fer› út á neti› — ein ró›ur. Ta› sum stendur ni›anfyri, er ta› vit funnu gjøgnum ein seinnapart.

Vit byrja›u á heimasí›uni hjá VIT og ø›rum, i› nevnist in.fo, og funnu nakrar fittar sló›ir, i› lógu undir heitinum: "N‡ggjar", i› eru feskastu heimasí›urnar á føroyska partinum av Alnetinum.

Fyrst vóru vit ein túr inni á heimasí›uni hjá Mi›flokkinum, og fregna›ust um hvat rørir seg á hesum partinum á politiska ví›vøllinum.

Vit ganga út frá at heimasí›an hjá flokkinum er n‡ggj, tí hóast hon er sera snotisliga uppsett, á trimum málum, so høvdu bert 97 fólk veri› har frammanundan okkum. Hartil vóru ta› bert tvær sló›ir, i› rigga›u, nevnliga Forsí›an og N‡tt. Annars funnu vit eina grein um, at Jenis av Rana ruddar forsí›una á Dimmalætting, og eina fitta mynd av manninum, i› myndar flokkin úteftir.



Mynd av heimasí›uni hjá Mi›flokkinum

Sí›ani gekk lei›in ví›ari til a›rar heimasí›ur, og millum n‡ggju føroysku sí›urnar funnu vit eina sló›, i› nevndist Night Walker. Hetta var eitt sera spennandi mi›. Men um vit skulu vera heilt erligir, so funnu vit ongantí› út av hvat hendan heimasí›an gekk út uppá.

Talan var um eina føroyska sló› (halda vit), men alt var sett upp á enskum. Ikki tí enska sum vit vanliga kenna, men hetta n‡ggja enska, har tøl og vanligir stavir, nú ikki eru stavir longur, men dulnevni fyri or›. Ja, ja solei›is er ta› vi› hesum ungu vildi onkur sagt, men frískligt, um ein ikki hevur málsligar fordómar hesum vi›víkjandi.

Annars ein sera flott sí›a, í besta Science Fiction stíli.



Mynd av heimasí›uni hjá Night Wlaker

Á vegunum til næstu sí›una, duttu vit um heimasí›una hjá Náttarravnunum í Sortud‡ki.

Sætt at siga, so er heimasí›an hjá Útvarp Føroya blivin rættiliga umfatandi, og ein ørgrynna av tilfari liggur á undirsí›unum, eisini hjá Náttarravnunum.

Eitt sum ÚF brúkar, er at allar sendingar hava fingi› sína egnu heimasí›u, solei›is at øll starvsfólk á stovninum eru vi› til at menna teirra kunningarkervi, og ta› er næstan ov genialt.

Mynd frá heimasí›uni hjá Náttarravnunum

At enda á fer› okkara, funnu vit eina sera forvitnisliga privata heimasí›u, i› er l‡st sum Eina Hansen, Webdesignari. Vit funnu út av, at talan eru um unga føroyska kvinnu, sum hevur fingi› sær útbúgving innan heimasí›usmí›, og starvast á økinum í danskari fyritøku.

Ta› sást eisini beinanvegin, at hóast talan var um privata heimasí›u, so var hon sera professionelt uppsett.

Vit dvølja ikki longur her, men til seinast skal vi›merkjast, at á sí›uni hjá Einu Hansen funnu vit – eftir okkara hugsan – nøkur gó› rá› til fólk i› ynskja at gera sína egnu heimasí›u, og hava tiki› hesi vi› ni›anfyri.

Annars er okkara fatan, at heimsins besta dagdvølja er ein túrur til útrógvar á netinum. Tí tá hendir altí› okkurt, og ein kann risikera at læra naka› av tí›. – Gó›an ró›ur.

Finn@sosialurin.fo

Nøkur designrá› sum føra til eina brúkaravinarliga heimasí›u

1. Set brúkaran í centrum:
   Hvørjar uppl‡singar og tænastur ynskir brúkarin?
2. Vís navigatiónsmøguleikarnar t‡›iliga.
3. Bjó›a brúkaranum so fáar valmøguleikar sum gjørligt.
4. N‡t ein brei›an struktur á sí›ini, ísta›in fyri ein djúpan í mesta lagi tr‡ klikk til innihaldi›.
5. Brúka somu navigeringsknappar o.s.fr. á øllum sí›unum.
6. Skjótleiki
   Ein heimasí›a má ikki taka ov langa tí› at downloada. Legg ikki óneyguan og tungan grafikk á sí›una, uttan ein serlig orsøk er til sta›ar.

Kelda: http://hjem.get2net.dk/eina/

Milliónfeilur hjá Pentium-III

Heimsins størsti framlei›ari av sínum slagi, Intel, fer at fáa oyruni í maskinuna í samband vi› at 1 millión av gerlum, i› nevnast 820 og 840, hava innbygdar feilir. Vantandi ver›ur talan um eitt tap uppá fleiri hundra› milliónir dollarar.

Longu í februar, funnu teir hjá Intel ein feil, i› ávirkar teldur i› n‡ta intel 840 og 820, men teir valdu ikki at almannakunngera feilin.

Hjá Intel ver›ur mett, at ein avlei›ing av at gerlarnir ikki rigga, kann hava vi› sær at maskinan frystur, ella kanska ver›ur nullstilla›.

Annars ver›ur víst til heimasí›una hjá Intel, har meira stendur at lesa um feilin.



Skur›mynd av Pentium-III Xeon vi› 733 MHz

Seks tímar av MP3 tónleiki í bilinum

Alnet fyritøkan Internet 2 Go er fyrst vi› einum MP3 spælara til bilar, i› nevnist Ergo Player. Hesin hevur eitt n‡tt slag av harddiskli, i› nevnist Microdrive. Á hesum rúmast 340 Mb, sum gevur umlei› 6 tímar av tónleiki í MP3 formati. Ta› er IBM i› framlei›ir Microdrive, sum er til støddar sum ein 10-króna. Hann ver›ur eisini n‡ttur til eitt nú farteldur.

Vi› Microdrive hevur Ergo Player lagt alla a›ra MP3 tøkni aftur um seg vi› fleiri bátslongdum. Vanligu MP3 spælarnir, vi› 16-32 Mb minni›, rúma bert heilt fáar MP3 sangir í senn.

Harafturat ver›ur uppl‡st, at tá Internet 2 Go kemur vi› n‡ggja MP3 spælarnum, ver›ur ta› gjørligt at installera tveir Micordrive í bilin, og harvi› kunna spæla tónleik í 12 tímar uttan íhald.



340MB Microdrive

REPROZ
GRAFISKAR LOYSNIR
Tel +298 31 95 40
Fax +298 31 75 41
Alt innan prentlutir
Mail: jakzac@post.olivant.fo

FØROYA TELE
FAROESE TELECOM
Tinghúsvegur 3 • Postrúm 27 • 110 Tórshavn
Tel. 30 30 30 • Fax 30 30 31
T-postur: ft@ft.fo
Heimasíða: www.tele.fo

ELEKTRON
...ein livandi leiklut í kunningarsamfelagnum

SpF Teldu Tænastan
Staravegur 9 • Tlf.: 317620 • Fax: 317699 • www.tt.fo

Vit hava stórt úrval av:
Teldum • EDV-tilhoyri
Printarum • Telefax
Scannarum • Forritum
Telduspølum • Fartelefonum
Skrivstovumøblum

SKEIÐTÆNASTA HANDILSSKÚLANS * STH
útbúgving, eftir- og víðariútbúgving á Føroya Handilsskúla
Marknagilsvegur 77
Postsmoga 177 • FO 110 Tórshavn
Tel. 31 88 13 • Fax 31 33 74
T-postur: fh-sth@post.olivant.fo
Heimasíða: http://sth.olivant.fo

WWW.VIT.FO Tlf: 31 99 14
SKEIÐ - NETUMSITING - HEIMASÍÐUR
JournalVIT - GóðskuVIT - KommunuVIT - IntraVIT

sam~teld